LM-103/2020

1.

Dátueftirlitið

Umhvørvis- og Vinnumálaráðið
Gongin 7
100 Tórshavn

Tórshavn, tann 20. januar 2021
J.nr: 21/00059-2
Tykkara skriv:
Málsviðgeri:

Viðvíkjandi.: Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um økisnøvn á internetinum

Dátueftirlitið hevur fingið til hoyringar uppskot til løgtingslóg um økisnøvn á internetinum.

Sambært § 10, stk. 4, í uppskotinum kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um innihaldið í trygdarpolitikkinum, heruppií trygdarkrøv og –standardar, krøv til kt-grannskoðan o.a.

Dátueftirlitið skal gera vart við, at tá persónupplýsingar verða viðgjørdar í kt-skipanunum, eru krøv í dátuverndarlógini[1] til, at dátuábyrgdarin skal seta í verk hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk, sum tryggja eitt trygdarstøði, sum hóskar til váðarnar, sum standast av viðgerðini.

Dátueftirlitið kann vísa á, at eftirlitið hevur gjørt eina vegleiðing um viðgerðartrygd. Í vegleiðingini er lýst, hvørji hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk eiga at verða sett í verk.

Vegna Dátueftirlitið

Hjørleivur Sørensen

[1] Løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum